**Ruth Vang**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 172/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)** (Leigubilar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald**
**(Meirvirðisgjaldslógin)**
(Leigubilar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 190 frá 21. desember 2018, verður § 10, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Fyri motorakfør, skrásett sum leiguakfør, og akfør, nýtt til skúlakoyring, kann reglan sbrt. stk. 1 verða nýtt. Fyri at akfar, nýtt til skúlakoyring, skal kunna viðgerast eftir stk. 1, skal tað hava verið nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir. Fyri at akfar, skrásett sum leiguakfar, skal kunna viðgerast eftir stk. 1, skal akfarið hava havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hava koyrt í minsta lagi 12.500 km og hava verið skrásett sum leiguakfar í minsta lagi 6 mánaðir, ella hava verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár. Uttan mun til søluprísin av leiguakfari, kann frádrátturin í avgjaldsupphæddini ongantíð fara upp um kr. 45.000."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá framløgudegnum.

**Almennar viðmerkingar**
Í løgtingsmáli nr. 46/2018 legði ein samd Fíggjarnevnd fram broytingaruppskot til § 10, stk. 2 í meirvirðisgjaldslógini. Hetta broytingaruppskot varð samtykt tann 19. desember 2018.

Tað hevur tó víst seg, at broytingin sum varð samtykt ikki hevur tænt sínum endamáli, tí at teir kostnaðarmiklu bilarnir, sum verða brúktir sum leiguakfør, ikki longur lúka treytirnar fyri at verða viðgjørdir sum leiguakfør.

Í dag er skipanin soleiðis, at bert teir bilar, sum hava fingið endurrindað í mesta lagi 45.000 kr. í meirvirðisgjaldi og annars lúka treytirnar í § 10, stk. 2 í meirvirðisgjaldslógini, verða viðgjørdir sambært § 10 í meirvirðisgjaldslógini. Teir bilar, sum hava fingið endurrindað meira enn 45.000 kr. í meirvirðisgjaldi, uppfylla ikki treytirnar fyri at verða viðgjørdir sum leigubilar.

Ætlanin var, at <u>allir</u> leigubilar, sum lúka treytirnar í § 10, stk. 2, skulu kunna fáa endurrindað meirvirðisgjaldið upp til 45.000 kr.

**Avleiðingarnar av uppskotinum**
Talan er um at rætta ta misskiljing, sum kom í, tá lógin varð broytt (lm. nr. 46/2018). Tað eru ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum, men nøkur leiguakfør, sum ikki uppfylla treytirnar í dag, fara fram eftir at vera fevnd av lógini.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Við uppskotinum kunnu øll leiguakfør, sum lúka eina av niðanfyrinevndu treytum, verða viðgjørd eftir regluni í § 10, stk. 1:
Treytin er at akfarið skal:
1) hava havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hava koyrt í minsta lagi 12.500 km og hava verið skrásett sum leiguakfar í minsta lagi 6 mánaðir,
ella
2) hava verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár.

Hóast treytirnar omanfyri eru uppfyltar, kann frádrátturin í meirvirðisgjaldinum ikki verða hægri enn 45.000 kr. Tað vil siga, at allir leigubilar, sum lúka treytirnar omanfyri, kunna fáa endurrindað meirvirðisgjald upp til 45.000 kr. Teir kostnaðarmiklu leigubilarnir koma ikki at fáa fult meirvirðisgjald endurrindað, men hesir fáa tó 45.000 kr.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 7. mars 2019**

Ruth Vang